| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**20. oktober 2008** | Blað nr.:<br>7530 |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**EYKA BÝRÁÐSFUNDUR**

**Dato:** **20. oktober 2008** **kl. 16.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 159/08-181/08**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Vagnur Johannesen møtti fyri Bjarta Mohr
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Bjarti Mohr, ið var uttanlanda.

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, KL.18.00**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**162/08** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 20. oktober 2008:** Yvirlitið var **f**ramlagt. Býráðslimir hildu ikki, at yvirlitið var fullfíggjað og at mál sum ikki hoyrdu heima har vóru við, meðan onnur mál ikki vóru við á yvirlitinum.

**163/08** **2008-1069**

**Mál viðv. lækna-, tannlækna og onnur heilsuørindi**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Áheitan er komin frá starvsfólkum um at sleppa til lækna, tannlækna og onnur heilsuørindi í arbeiðstíðini

Samstarvsnevndin hevur orðað eitt broytingaruppskot til politikkin fyri lækna, tannlækna og onnur heilsuørindi.

Broytingaruppskotið verður við hesum lagt fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein minniluti, Jan Christiansen, krevur málið fyri býráðið við tilmæli um ikki at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Fyrst var atkvøtt um uppskotið hjá Jan Christiansen sum fall við 1 atkvøðu fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddi: Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov. Greiddu ikki atkvøðu Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Síðani var atkvøtt um uppskotið hjá Jógvan Arge, sum skjeyt upp at taka undir við broytingaruppskotinum sum var. Atkvøtt var um uppskotið, sum var samtykt við 12 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**164/08** **2008-4364**

**Skúlastýrisval**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
§ 1, stk 2, í kunngerð nr.86 um at velja foreldraumboð í skúlastýrini ásetir, at valið til skúlastýrini verður hildið sama dag sum val til allar føroyskar kommunur, og valið verður eftir avgerð kommunustýrisins hildið í somu hølum sum kommunuvalið, har hetta ber til.

Endamálið við broytingini er at fáa fleiri foreldur á val, tí valluttøkan til valini frammanundan hevur verið lítil. Tí er umráðandi, at valið fer fram í somu hølum sum kommunuvalið.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til, at valið til skúlastýrini fer fram í hesum valstøðum:

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Kommunuskúli: | Høllin á Hálsi |
| Venjingarskúlin: | Høllin á Hálsi |
| Eysturskúlin: | Høllin á Hálsi |
| Sankta Frans skúli: | Høllin á Hálsi |
| Hoyvíkar skúli: | Høllin á Hálsi |
| Skúlin við Løgmannabreyt: | Høllin á Hálsi |
| Kaldbaks skúli: | Valstaðið í Kaldbak |
| Argja skúli: | Valstaðið á Argjum |
| Kollafjarðar skúli: | Valstaðið í Kollafirði |

| | |
|---|---|
| Nólsoyar skúli: | Valstaðið í Nólsoy |
| Velbastaðar skúli: | Valstaðið á Velbastað |

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**165/08** **2008-4260**

**Mál um uppskot til samanlegging av Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag í eitt kommunufelag fyri allar kommunur**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Stýrisumboð fyri Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag hava samráðst um stovning av nýggjum kommunufelag, ið skal fevna um allar kommunur í Føroyum, og hava í tí sambandi gjørt uppskot til at stovnan, - uppskotið er í málinum.

Ætlanin er eisini, at Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya í samráð við SEV og IRF verður tikið av samstundis, og at virkisøkið verður lagt til nýggja felagið.

Høvuðsendamálið er at savna orkuna og styrkja tað felags kommunalpolitiska arbeiðið bæði í samskiftinum við landsmyndugleikarnar og í mun til at veita betri tænastur og ráðgeving til kommunurnar.

Partarnir eru samdir um, at kommunurnar í framtíðini eiga at umsita øll málsøki av týdningi fyri borgaran, tí kommunurnar kenna tørvin hjá borgarunum best, og kunnu tryggja betri og skjótari tænastu.

31. oktober er settur til avtøkuaðalfund og stovnandi aðalfund.

**Tilmæli.**
Borgarstjórin, sum er formaður fyri stýrinum, og kommunustjórin, sum er formaður fyri starvsbólkinum, mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at góðtaka uppskot til stovning av nýggjum kommunufelag, hvørs navn verður Kommunufelagið, stytt KF, og at góðtaka uppskot til viðtøkur.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Málið verður lagt fyri býráðið á forfundi og á fundi fyri opnum hurðum.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við tankanum um at skipa eitt kommunufelag, men metir ikki, at uppskotið er greitt til støðutakan og beinir málið aftur til stýrið í KSF til víðari viðgerð.

**166/08** **2008-4365**

**Reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**

Tórshavnar kommuna hevur samsvarandi almennu heimildunum, ið fylgja býarskipanarlógini, sum byggivald rætt til at regulera uppseting av vindmyllum til húsbrúk sum byggimál. Eisini kann kommunan sum umhvørvismyndugleiki regulera vindmyllur til húsbrúk fyri soleiðis at tryggja sær, at hesar virða tær umhvørvisreglur, ið kommunan sum umhvørvismyndugleiki hevur ábyrgd av (sí serliga § 8 í kunngerð nr. 53 frá 1994 um umhvørvisreglur).

Farast kann ikki undir uppseting av myllu, fyrrenn skrivligt loyvi fyriliggur frá kommununi.

1. Vindmyllur til húsbrúk eru smáar vindmyllur, ið geva ískoytisorku til húsarhaldið, og sum ikki spenna meira enn 2.00 m í tvørmát (diametur).

2. Umsókn:
   Áðrenn farið verður undir at seta upp vindmyllur, skal umsókn um byggiloyvi sendast kommununi. Umsóknin skal í minsta lagi fevna um:

   a) Støðumynd (1:500) við mátum og plasering á grundstykki og fjarstøðu til næstu grannamørk og grannabygningar
   b) Síðumyndir (1:100)
   c) Tvørskurð (1:50) við øllum neyðugum mátum
   d) Fundamentstekningar (1:50) og upplýsingar um mastratypu o.a.
   e) Skjalprógv fyri, at myllan lýkur ásettar óljóðstreytir, sí pkt. 3, e, niðanfyri
   f) Frágreiðing um, hvussu myllan er fest og skjalprógv fyri, hvussu nógvan vind myllan tolir, sí pkt. 3, g, niðanfyri

3. Krøv: Krøvini til einstøku myllurnar

   a) Tvørmát má í mesta lagi vera 2 m.
   b) Hædd: Loyvda hæddin er í mesta lagi 3.5 m. omanfyri mest loyvdu byggihædd (miðaljørðildi), mált í mun til hægsta veingjapunkt á mylluni. Tó kann mesta hædd ongantíð vera meira enn 12.5 m. Hæddin upp til lægsta punkt á veingjum skal í minsta lagi verða 4 m.
   c) Frástøða: Til nærmasta grannamark skal í minsta lagi vera 10 m. Myllan skal undir øllum umstøðum standa nærri húsinum, ið fær orku frá mylluni, enn grannahúsum. Øll mát eru í vatnrættari linju. Tá talan er um óbygda grannaogn, ella myllan er sett uttan fyri sethúsaøkið, verður neyðuga frástøðan og hæddin ásett í hvørjum einstøkum føri.

d) Óljóðstreytir o.a.: Óljóðið frá vindmylluni má ikki vera meira enn 39 og 37 dB við vindmegi á ávikavist 8 og 6 m/s mált inni á grannaogn við næsta húsavegg. Aðrir ampar enn hesir kunnu vera av óljóði o.ø., ið stendst av brúkinum, og skal kommunan taka støðu í hvørjum einstøkum føri, um brúkið er sambæriligt við umhvørvisreglurnar.
e) Styrkikrøv: Vindmyllan skal vera styrkigóðkend til vindferð í minsta lagi 60 m/s.
f) Onnur Krøv: Sjálv vindmyllan má ikki víkja avgerandi frá hæddini á øðrum konstruktiónum í umráðnum. Vindmyllan skal hava eina yvirflatu, sum í minst møguligan mun órógvar og reflekterar ljós.

4. Varnast kommunan, ella verður kommunan av øðrum gjørd varug við, at vindmyllan ikki lýkur ásetingarnar omanfyri, kann kommunan krevja, at vindmyllan fyribils verður steðgað. Verða viðurskiftini ikki fingin í rættlag, kann kommunan krevja, at vindmyllan verður tikin niður.

5. Kommunan ger vart við, at skaðar, ið vindmyllur gera á persónar ella annan mans ogn, eftir umstøðunum kunnu hava við sær endurgjaldsábyrgd fyri eigaran. Kommunan kann sum byggi- og umhvørvismyndugleiki ikki ábyrgdast fyri slíkar møguligar skaðar.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið til reglugerð, treytað av undirtøku frá byggi- og býarskipanarnevndini og heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Jan Christiansen um at beina avvarandi nevndir.

**167/08** **<u>2008-3945</u>**

**<u>Rættará, niðasti partur</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Vísandi til heildarætlanina “Reinsan av vestaru vág” vantar at gera kloakkarbeiðið frá Seturstovninum og oman til Skálatrøð.

Arbeiðið fevnir um leggjan av nýggjari kloakkleiðing við pumpubrunni, ið verður leidd heim til Bøgøtu. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión fyrst í 2009.

**Fíggjarviðurskifti:**

Sambært yvirlitinum eru avsettar kr. 1.000.000,- fyri árið 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Sp/f Martin E. Leo ger projekt og kostnaðarmeting klárt til útbjóðing og at játta kr. 350.000,- til endamálið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**168/08** **2008-3946**

**Reinsiverk við Súpanarvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Vísandi til fíggjarætlanina fyri 2008, verður biðið um at arbeiðið við projektering og útbjóðing kann verða gjørt her í heyst. Í hesum sambandi er ætlanin at fáa verandi kloakkútlop, ið er sera vánaligt, gjørt samstundis.

**Fíggjarviðurskifti:**
Til hesi arbeiði er avsett ávikavist kr. 1.300.000,- og kr. 600.000,- fyri 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Sp/f Martin E. Leo ger projekt og kostnaðarmeting klárt til útbjóðing í september og at játta kr. 200.000,- til endamálið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**169/08** <u>**2008-0231**</u>

<u>**Kloakk fram við Hoydalsá, partur av stig ll**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Sambært ætlan fyri kloakkarbeiði í 2008, er ætlanin at halda fram við stigi ll, ið fevnir um kloakk við pumpubrunni norðan fyri Eystara Ringveg (Hilmar Kass), íð er framhald av arbeiðinum undir Svartafossi.

<u>Fíggjarlig viðurskifti</u>:
Sambært íløguætlanini eru settar 2,5 mill. kr. til nevnda kloakkarbeiðið.

Ætlanin er at fara undir projektering beinanvegin, so arbeiðið kann verða liðugt til várs.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2,5 mill. kr. til arbeiðið (projektering og eftirlit íroknað) fíggjað av íløgum fyri kloakkir í 2008.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

- Biðið verður um kr. 300.000,- til projektering av útbjóðingartilfari at fíggja av konto fyri íløgur.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008: :** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 300.000,- til projektering av útbjóðingartilfari at fíggja av konto fyri íløgur.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Arbeiðið var útboðið millum 4 arbeiðstakarar, og var lisitatión hildin á teknistovuni hjá Sp/f. Martin E. Leo hósdagin 11. sept. 2008, kl. 11.00.

Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal hevði lægsta boð, ið er kr. 1.066.330,-. Sí hjálagda skjal.

Tilboðini eru kannað, og verður mælt til at tikið verður við tilboðnum frá Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal.

<u>Fíggjarviðurskifti</u>:

| | |
|---|---|
| Tilboð | kr. 1.066.330,- |
| Projekt og eftirlit | kr. 220.000,- |
| Ókent 15% | kr. 160.000,- |
| MVC 6,25% | <u>kr. 89.146,-</u> |
| Samanlagt | kr. 1.515.476,- |
| Áður játtað til projektering | <u>kr. 300.000,-</u> |

Biðið veerður um kr. 1.215.476,-

Avsett í fíggjarætlanini fyri 2008 eru 2.500.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður við tilboðnum og fíggja av íløgum fyri 2008.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**170/08** **2008-3998**

**Kloakk á Argjum**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við íløguætlanina fyri 2008 eru avsettar kr. 750.000,-.

Ætlanin er at fáa rættað uppá fleiri kloakkbrek í Reynstúni, Reynsgøtu og Støðlatúni, har kloakkrørini eru alt ov trong í mun til íbindingarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at farið verður undir nevndu arbeiðir í inniverandi ári og at játta kr. 750.000,- til arbeiðið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**171/08** **2008-3944**

**Kloakk fram við Hoydalsá, stig 1**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til ætlanina fyri kloakkarbeiði í 2008, er ætlanin at fara undir ovara partin á stig 1, ið umfatar kloakkina frá Petur Nolsøe og oman til Vegin Langa.

Biðið verður um at Sp/f Matin E. Leo, sum hevur gjørt kanningararbeiðið og skitsuprojekt, heldur fram við projektering og útbjóðing av nevnda arbeiði. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión í oktober 2008.

**Fíggjarviðurskifti:**
Sambært fíggjarætlan fyri kloakkarbeiði í 2008 eru avsettar kr. 2.800.000,- til nevnda arbeiði. Umsitingin hevur saman við ráðgeva lati gera eina kostnaðarmeting 2008-3944/2. Kostnaðurin fyri kloakk arbeiðið er innan ásettu fíggjarkarmarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað verður kr. 400.000,- til projektering og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við teknsiku nevnd, peningur til projektering verður lagdur út av teknisku umsitingini av øðrum projektum og endaliga samtykt í 2009.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**172/08** **2008-4256**

**Útbúnaðurin á bátaøkinum við Skálatrøð og Kongabrúnna.**

Lýsing av málinum - samandráttur.
Sum heild er útbúnaðurin, so sum teymar og grundketur o.a. í góðum standi, allar ketur og teymar verða kannaðar av kavara hvørt heyst, soleiðis at alt neyðugt viðlíkahaldsarbeiði er gjørt, áðrenn veturin kemur, eisini verður alt skrásett, soleiðis at vit kunnu vita, nær neyðugt at skifta ketur og teymar út.

Men í Tórshavn við Skálatrøð og Kongabrúnna eru bátabummarnir til flótibrúgvarnar og

el-skipanin í sera ringum standi.

Viðvíkjandi bátabummunum hava vit í dag tann trupulleika, at teir eru blivnir 26 ára gamlir, og eru sostatt farnir 1 ár útyvir ta livitíð, sum framleiðarin hevur sett á. Seinastu árini eru fleiri og fleiri bummar brotnir hvønn vetur, og seinasta vetur (2007) brotnaðu bummar nærum hvørja ferð illveður var. Brotnu bummarnir gera onkuntíð skaða uppá bátarnar sum liggja har. Hetta er ein óheppin støða, sum neyðgut er at gera nakað við. Tilsamans kosta nýggir bummar um 4 mió.

El-skipanin er 10 ára gomul og í ringum standi, nógvur peningur verður hvørt ár nýttur til at umvæla og skifta káplar, men hetta er alt bert lappaloysnir. Tilsamans kosta nýggj el-skipan um 2 milliónir krónur.

Sostatt standa útreiðslur uppá umleið 6 mió. fyri framman, sum ikki kunnu fíggjast um vanliga raksturin.

Um bátagjaldið verður hækkað fyri at fáa samlaða raksturin at javnviga, so kann peningur savnast til at fíggja hesar stóru høvuðsumvælingar frameftir, men størsti parturin av peninginum til nýggjar bummar og el-skipan má útvegast beinanvegin.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og havnameistarin mæla til, at býráðið játtar 4 mió. til hesar høvuðsumvælingar, sum verða gjørdar yvir eitt 3 ára skeið.

Arbeitt verður við ætlan um loysn av restfíggingini.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og havnameistaranum av konto 90.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 6 atkvøðum fyri og 0 ímóti at taka undir við uppskotinum frá Elin Lindenskov um at beina málið í havnanevndina.

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

**173/08** **2008-4027**

**Umsókn frá Advokatskrivstovuni, sum vegna P/F Farcod søkir um at leingja leigusáttmálan av leigaðum lendi undir 970p og q í Álakeri.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
P/F Farcod eigur bygningarnar á leigaðum lendi matr.nr. 970p og q hjá Tórshavnar havn í Álakeri.

Sambært leigusáttmálanum millum Tórshavnar havn og P/F Farcod kann sáttmálin sigast upp við eitt ára freist til ein 1. januar aftan á 31. desember 2012.

Søkt verður um at leigusáttmálarnir verða longdir.

Í §10 í leigusáttmálanum stendur m.a. soleiðis:
*Tá leigumálið er at enda komið sambært §1, skal økið latast eigaranum aftur slættað og ruddað fyri alt.*

*Er virksemi á økinum, ið lúkar treytirnar í §3, tá leigumálið gongur út sambært §1, og eigarin ikki ynskir at taka økið til egið brúk smb. 1. petti í hesi grein, hevur leigarin tó rætt til at leingja leigumálið við 10 árum afturat móti framvegis at gjalda leigu eftir teimum takstum, ið til eina og hvørja tíð galda fyri leigu á økinum.*

Í § 3 í leigusáttmálanum stendur:
*Økið verður at nýta sum grundøki til virkisbygning, sum stendur á staðnum, og sum skal nýtast til trolvirki og viðgerð av skipaútgerð o.a. virksemi í hesum sambandi.*

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at longja leigusáttmálarnar við 10 árum.

**Havnarnevndin 29. september 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við Havnanevndini.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**174/08** **2008-4261**

**Framflyting av karmi til bygging av smábátahavnum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Býráðið markar árliga kr. 5 mió. til nýgerð av plássum til smábátar og raðfestur íløgurnar sambært tørvi

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og havnameistarin søkja um at tær óbrúktu kr. 4.7 mió. verða framfluttar til 2009, markað til smábátahavnir.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**175/08** **2008-0979**

**Umsókn til Búnaðarstovuna um keyp av lendi til veg úr Dánjalstrøð og útstykking til grundøkir, matr. nr. 1176, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Víst verður til heildarætlanina fyri ognirnar frá Marknagilsá til Kongsgil, sí j. nr. 2004-1071. Í hesum sambandi skal vegur gerast frá Dánjalstrøð og eystur ímóti matr. nr. 1215a, sí plantekning j. nr. 2004-1071/29.

Ætlanin er eisini at útstykkja nøkur grundøkir fram við vegnum.

Fyri at kunna gera veg og útstykkja, er neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at ogna sær lendi, matr. nr. 1176, Tórshavn. Tað er umleið 5.776 m2.

Umsitingin hevur gjørt eina tekning, sí TK j. nr. 2008-0979/1.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Tórshavnar kommuna søkir Búnaðarstovuna um loyvi at ogna sær lendið, matr. nr. 1176, Tórshavn, umleið 5.776 m2.

Umboð fyri teknisku deild kemur á fundin at greiða frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjað av útstykking á Dánjalstrøð.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur í samband við umbøn um at keypa matr. nr. 1176, Tórshavn, vent sær til kommununa við fyrispurningi um, hvørt kommunan er sinnað at søkja um at keypa allan matr. nr. 1176.

Matr. nr. 1176 er í tveimum lutum, og hava fíggjarnevndin og býráðið áður samtykt at keypa lutin, ið er til víddar 5.776 m² í samband við útstykking og vegagerð frá Dánjalstrøð og eystureftir.

Hin luturin liggur burturfrá, og er partur av sjálvum Marknagilsvegnum, og er til víddar 1.017 m².

Fyri at lætta um og til tess at sleppa undan drúgva arbeiðinum at sundurbýta minna lutin frá størra lutinum hevur Búnaðarstovan heitt á kommununa um at keypa allan matrikulin, ið er til víddar 6.793 m².
Umsitingin hevur tann 25. juli 2008 sent Búnaðarstovuni umsókn samsvarandi hesum, sí skjal 2008-0979 við tilhoyrandi kortskjali.

Í skrivi frá 4. september 2008 hevur Búnaðarstovan játtað umsóknina.

Samlaði kostnaðurin fyri at keypa matr. nr. 1176 frá Búnaðarstovuni er:

| | |
|---|---|
| Keypspeningur: 6.793 m² á kr. 110,00 | kr. 747.230,00 |
| Avlosing av biti: 6.793 m² á kr. 0,70 | kr. 4.755,10 |
| Tinglýsing | kr. 4.736,15 |
| Sakargjald | kr. 11.208,45 |
| Íalt ........................... | kr. 767.929,70 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Tórshavnar kommuna góðkennir keyp av matr. nr. 1176 frá Búnaðarstovuni fyri tann kostnað og við teimum treytum, ið Búnaðarstovan hevur ásett í skrivi frá 4. september 2008.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum at fíggja av konto fyri keyp og sølu av jørð.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**176/08** **2007-2927**

**Viðv. yvirtøku av einum parti av Heiðatúni, Argir**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Dania Arge Mouritsen, Heidavegur 9, Argir & Ása Arge Henriksen, Dr. Dahls gøta 5, Tórshavn, heita á Tórshavnar kommunu um at yvirtaka ein part av Heiðatúni matr. nr 205h, Argir.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og løgdeildin mælir til at koyra málið í viðkomandi nevndir til ummælis.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

- Vegdeildin hjá kommununi er farin undir fyrireikandi arbeiði í sambandi við asfaltætlanina fyri 2008. Farið er undir at leggja regnvatnsleiðingar á kommunala partinum av Heiðatúni.
Um so er, at innari partur av Heiðatúni, ið er privatur vegur, eisini skal asfalterast, er neyðugt at regnvatnsleidningsarbeiði eisini skal gerast. Leystliga mett kemur hetta arbeiði at kosta uml. kr. 160.000,-.

Sambært mannagongdum í sambandi við yvirtøku av privatum vegum (j. nr 2000-2712/7) verður víst til fylgjandi grundreglar:

1. vegirnir lúka 'vanligar treytir', tvs. tekniskar treytir, sum tekniska deildin setur umframt treytir smb. ásetingum í byggisamtykt. Treytir, sum tekniska deildin setir fyri yvirtøku, kunnu millum annað vera, at vegurin ikki skal vera ov smalur ella brattur.
2. vegirnir verða bólkaðir í bólk 1 og bólk 2 umframt hvat slag av vegi talan er um.

Ad 2

- Bólkur 1:
  Her er talan um vegir, sum eru gjørdir samsvarandi góðkendum projekti ella øðrum ítøkiligum ætlanum, og sum ikki kosta kommununi pening at gera aftur í sambandi við yvirtøku.
- Bólkur 2:

Her er talan um gamlar vegir, (uppdyrkingarvegir, sethúsavegir ella onnur sløg) sum á ein ella annan hátt aldri eru yvirtiknir og tíans heldur ikki liðugt gjørdir. Talan skal vera um vegir, sum hava verið nýttir av almenninginum í longri ella styttri tíðarskeið. Í hesum førum má kommunan rinda kostnaðin fyri at vegirnir lúka eitt ávíst 'kommunalt støði'

Setir kommunan fram krav um, at yvirtøka av vegnum skal vera 'ókeypis', ber ikki til at ganga umbønini hjá umsøkjarunum á møti. Men verða onnur viðurskifti tikin við í metingini, ber til at ganga umsókníni á møti. Onnur viðurskifti kundu verið t.d.

- at tað upp á longri sikt er ein fyrimunur hjá kommununi at eiga vegin – lættari atkomuligt
- at ein yvirtøka kemur væntandi at hindra fyri óskipaðari matrikulering
- at sleppast kann undan óneyðugum grannastríði.

Fyritreytirnar, ið eru at
1. tað ikki skal kosta kommununi pening og
2. tað skal verða ein fyrimunur hjá kommununi at yvirtaka vegin
eru sostatt ikki galdandi fyri eini møguligari yvirtøku av Heiðatúni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at yvirtaka vegin við teirri grundgeving, at omanfyri standandi fyritreytir ikki eru uppfylgdar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti, at umsitingin fer undir samráðingar við eigararnar av matr. nr. 205h og 208g um yvirtøku av vegunum.

- Eigararnir hava í skrivi, dagf. 8. juni 2008, til umsitingina boðað frá, at tey ikki kunnu góðtaka uppleggið frá umsitingini. Tey meta, at talan er um løgnan framburð og vísa á, at kommunan skal síggja burtur frá umsókn teirra um at fáa vegin yvirtiknan.

**Tilmæli:**
Vísandi til støðu eigaranna, í skrivi, dagf. 8. juni 2008, viðv. kommunalari yvirtøku av ognini, vísa tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til tilmælið 8. mai 2008 og mæla frá at yvirtaka vegin.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Útsett.

**Ískoyti:**
Farið verður á staðið.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Nevndin samtykti at kommunan yvirtekur Heiðatún, vísandi til at kommunan frammanundan hevur yvirtikið helvtina av vegnum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**177/08** **2006-1122 (sí eisini mál nr. 2008-4129)**

**Viðvíkjandi yvirtøku av matr. nr. 37-208g - Borgartún, Argir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Eigarin av matr. nr. 208g, Kirkjubøur, Anna á Borg biður kommununa um at yvirtaka vegøkið Borgartún á Argjum.

Einki er til hindurs fyri at yvirtaka Borgartún.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at yvirtaka Borgartún, og senda málið víðari til teknisku nevnd til góðkenningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

- Borgartún lýkur ikki tær treytir, sum Tórshavnar kommuna í dag setir til tílíkar vegir, og treingir - um matr. nr. 37-208g verður yvirtikið – til grundleggjandi ábøtur í sambandi við liðuggerð av vegnum sambært notati frá teknisku deild í málinum, j.nr. 2006-1122/3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at yvirtaka Borgartún – matr. nr. 37-208g, tá ið vegurin lýkur tey vegateknisku krøv, ið kommunan setir.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.
Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, mælti til at yvirtaka vegin beinanvegin.

**Ískoyti:**
Farið verður á staðið.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Nevndin samtykti at kommunan yvirtekur Borgartún, vísandi til at kommunan frammanundan hevur yvirtikið helvtina av vegnum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**178/08** **2008-3983**

**Uppskot til ársfíggjarætlan 2009 hjá Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur 11. september 2008, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2009, ið javnvigar við tkr. 617.692.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2009, við støði í samtyktunum hjá faknevndunum, og javnvigar uppskotið nú við 1. viðgerð við tkr. 656.892. Munurin tkr. 39.200 kemst av framfluttum íløgum.

**1. viðgerð:**

**Útreiðslur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konto 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 24.226 |
| - 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.172 |
| - 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 19.648 |
| - 04 | Kt-deildin | - | 6.077 |
| | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **59.123** |
| | | | |
| Konto11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.273 |
| - 12 | Umhvørvismál | - | 1.600 |
| - 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13547 |
| - 15 | Renovatión | - | 19.238 |
| - 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 19.300 |
| - 18 | Bussleiðin | - | 19.341 |
| - 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 10.152 |
| - 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.199 |
| | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.650** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 560 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 844 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 416 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.678 |
| - | 241 | Ítróttarhøllin í Kollafirði | - | 500 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.527 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 4.085 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.396 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.316 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.463 |
| - | 291 | Hoyvíkshøllin | - | 475 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.612 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.128 |
| | 310 | Skúlin við Løgmannabreyt | - | 2.682 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.825 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 4.457 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **47.014** |
| | | | | |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 601 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.839 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.743 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.051 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 11.860 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **32.116** |
| | | | | |
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 19.457 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.510 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 395 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 10.300 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 670 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 590 |
| - | 435 | Sambýlið í Mattalág | - | 670 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| - | 441 | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **36.592** |
| | | | | |
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 6.310 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.760 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 5.062 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.531 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.578 |
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.721 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.702 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 2.626 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.816 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.911 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 4.757 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.539 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.808 |
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.977 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 3.197 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 4.243 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 3.826 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 6.546 |
| - | 568 | Barnagarðurin á Velbastað | - | 3.289 |
| - | 569 | Dagstovnurin Látrið | - | 1.231 |
| - | 572 | FTS í Hornabø | - | 1.653 |
| - | 573 | FTS Smílibýlið | - | 1.378 |
| - | 574 | FTS Blóma | - | 2.287 |
| - | 575 | FTS í Badmintonhøllini | - | 1.763 |
| - | 579 | FTS í Hoyvík | - | 1.984 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 3.292 |
| - | 582 | Dagstovnurin Birkilund | - | 6.137 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 1.214 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.578 |
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.931 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.490 |
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.730 |
| - | 588 | Margarinfabrikkin | - | 2.581 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 14.348 |
| | 599 | Barna- og ungdómsdeildin | - | 24.170 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **138.966** |
| | | | | |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 11.210 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 42.335 |
| | 63 | Útveganir | - | 5.000 |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 7.000 |
| | 69 | Nýútvegan av amboðum | - | 3.000 |
| | | | | |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **68.545** |
| | | | | |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **2.500** |
| | | **Rakstrarútreiðslur íalt** | **kr.** | **498.506** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 145.200 |
| | Smábátahavn | | - | 4.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **647.706** |
| | | | | |
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 7.236 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 1.950 |
| | **Lánsgjøld** | | **kr.** | **9.186** |
| | | | | |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **656.892** |

**Inntøkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 3.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000 |
| - | 85 | Aðrar inntøkur og útreiðslur | - | 0 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 598.796 |
| | At fíggja v. tøkum/framfluttur peningi | | - | 52.096 |
| | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | | **kr.** | **656.892** |

**Íløgur:**

| | | |
|---|---|---|
| Glyvursvegur 1-4. stig | kr. | 5.000 |
| Kloakkir | - | 10.000 |
| Renovatión | - | 2.200 |
| Kirkjugarðar | - | 2.000 |
| Fríðkan av býnum | - | 2.500 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | - | 29.500 |
| Barnaansing | - | 2.000 |
| Skúlar og mentan | - | 87.000 |
| Eldraøkið | - | 5.000 |
| Smábátahavnir | - | 4.000 |
| | | |
| **Tilsamans** | **kr.** | **149.200** |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen samtyktu at taka undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen taka støðu seinni.

Byggi- og býarskipanarnevndin umsitur konto 38 og 82.

**Sosiala nevnd 2. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Sosiala nevnd umsitur konto 40, 41, 411, 42, 43, 431, 432, 433, 434, 435, 44 og 441.

**Brunanevndin 2. oktober 2008:** Samtykt at fíggjarætlanin verður kr. 10.152 mió.

Málið fer í fíggjarnevndina.

Konto 68 Útskiftan av amboðum – vísir nevndin á, at kommunan eigur amboð o.a. fyri kr. 100 mió. og tí verður mælt til at seta meira enn 6 mió. av í 2009.

Brunanevndin umsitur konto 19 og viðmælur konto 68, sum fíggjarnevndin umsitur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. oktober 2008:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, samtykti at beina málið í fíggjarnevndina við eini samlaðari upphædd til veitingar innan umhvørvi áljóðandi tkr. 20.838. Ein annar minniluti, Jan Christiansen og Beate L. Samuelsen tekur støðu á einum seinni fundi.

Heilsu- og umhvørvisnevndin umsitur konto 12 og 15.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Inga Dahl, taka støðu á býráðsfundi.

Mentamálanevndin umsitur konto 20, 21, 22, 23, 24, 241, 25, 26, 27, 28, 29, 291, 30, 31, 310, 32, 33, 34, 35, 36, 37, 39 og 64.

Eisini umsitur mentamálanevndin hesar kontoir 45, 46, 47, 48, 49, 50, 51, 52, 53, 54, 560, 561, 562, 563, 564, 565, 566, 567, 568, 569, 572, 573, 574, 575, 579, 58, 582, 583, 584, 585, 587, 589, 588, 59 og 599.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við ársfíggjarætlanini álj. tkr. 70.401 og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

Tekniska nevndin mælir harumframt til at avsettar verða á konto 60-3500 hátíðarhald, flagging o.a. tkr. 940, 60-7170 inntøkur av parkeringsskipanini tkr. 2.500 og 60-6171 útreiðslur av parkeringsskipanini tkr. 1.500.

Tekniska nevndin umsitur konto 11, 14, 16 og 18.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 0 ímóti at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge,  Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Jan Christiansen , Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Jan Christiansen boðaði frá, at minnilutin kemur við broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**179/08** **2008-3913**

**Fíggjarætlanin 2009 hjá Tórshavnar Havn**

Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Áðrenn fíggjarnevndin framleggur uppskot til fíggjarætlan, leggur fíggjarnevndin uppskot til fíggjarkarmar fyri býráðið til nevndirnar at leggja fíggjarætlan eftir.

**Havnarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at leggja karmarnar uppá tkr. 50.500 fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at taka undir við havnarnevdnini.

**Býráðið 11. september 2008:** Framlagt.

**Havnarnevndin 29. september 2008:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 50.500 og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til ársfíggjarætlan 2009 við 1. viðgerð.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til ársfíggjarætlan 2009 við 1. viðgerð.

**180/08** **2008-4365**

**Framløga av karmum fyri langtíðaríløgur**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vegir** | 5.000 | 12.000 | 21.000 | 12.000 | 23.000 | 12.000 |
| **Kloakkir** | 10.000 | 3.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Vatnveitingar** | | | | 28.500 | 54.000 | 34.500 |
| **Renovation** | 2.200 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Kirkjugarðar** | 2.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | |
| **Fríðkan av býnum** | 2.500 | 3.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Ítróttur og frítíðarvirksemi** | 29.500 | 14.000 | | | | |
| **Barnaansing** | 2.000 | 2.000 | | | 10.000 | 10.000 |
| **Skúlar og mentan** | 87.000 | 83.000 | 74.000 | 57.000 | 13.000 | 40.000 |
| **Eldraøkið** | 5.000 | 1.000 | 10.000 | 9.500 | 10.000 | 7.500 |
| **Smábátahavnir** | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| | | | | | | |
| | **149.200** | **130.000** | **128.000** | **130.000** | **133.000** | **124.000** |
| | | | | | | |
| **Eldarøkið: Landsstýrið rindar afturat 12 mió. kr. í stuðli.** | | | | | | |

**Býráðið 20. oktober 2008:** Framlagt.

**181/08** **2003-2267**

**Eyrith Leyni: Viðv. parkeringstrupulleikum hjá Eyrith Leyni, Tórgarðsgøtu 4. Heitir á kommununa um at fáa parkeringsviðurskiftini í ordan aftur.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Eyrith Leyni hevur í skrivi, dagfest 20. november 2003, heitt á Tórshavnar kommunu um at fáa parkeringsviðurskiftir hennara í lagi aftur.

Eyrith Leyni vísir á, at Tórshavnar kommuna hevur skapt trupulleikan við atkomumøguleikanum til Tórgarðsgøtu 4, við at sprongja vegin einar 2-3 metrar niður, í sambandi við breiðkanina av Tórgarðsgøtu.
Tórgarðsgøta varð breiðkað í 70-árunum.

Á Torgarðsgøtu er parkeringsforboð á báðum síðum, og tí er ikki møguleiki hjá Eyrith Leyni at nýta Tórgarðsgøtu at parkera á.

Eyrith Leyni biður um antin at fáa ávíst parkeringspláss á Hamarsgøtu ella fáa møguleika at koyra inn á grundstykkið aftan fyri húsini, tvs. í gjøgnum matr. nr. 667d.

Umsitingin hevur havt fund við eigaran av matr. nr. 667d, og biðið viðkomandi um viðmerkingar.

Eigarin av matr. nr. 667d vil ikki geva Eyrith Leyni atkomumøguleika gjøgnum sína ogn.

Trupulleikar eru við ferðslu- og parkeringsviðurskiftunum á niðara parti av Hamarsgøtu, og tí verður mælt frá at ávísa parkeringspláss á Hamarsgøtu.

Ein loysn kundi verið, at tikið samráðingar upp við eigaran av matr. nr. 664, sunnan fyri Tórgarðsgøtu, um møguleika at gera parkeringøki á matr. nr. 664, soleiðis at parkeringsviðurskiftini á niðara parti av Hamarsgøtu og Tórgarðsgøtu verða loyst.

Eyrith Leyni kemur at greiða frá.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at royna at taka upp samráðingar við eigaran av matr. nr. 664, Tórshavn. Í øðrum lagi at staðfesta trupulleikan og ikki gera meir við málið.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin fer undir samráðingar við eigaran av matr. nr. 667d at loysa atkomutrupulleikarnar hjá matr. nr. 666b. Í øðrum lagi verður mælt býráðnum um fíggjarnevndina at ognartaka vegatkomuna á matriklinum.

**Nýtt:**

Fundur hevur verið við eigaran av matr. nr. 667d og er niðurstøðan hjá teimum óbroytt, og tað merkir at tað ikki verður givið loyvi til at atkoman til matr. nr. 666b verður í gjøgnum matr. nr. 667d.

Eigarin av matr. nr. 667d ynskir at koma á fund í teknisku nevnd fyri at greiða síni sjónarmið.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin kannar møguleikarnar fyri parkeringsplássi á økinum við Tórgarðsgøtu.

**Nýtt:**
Eyrit Leyni hevur boðað umsitingin frá, at hon ikki er nøgd við seinastu avgerðina hjá teknisku nevnd. Hon vísir á, at trupulleikarnir, ið hon hevur av væntandi parkering og atkomuviurskiftum, skyldast kommununi eina og vil fegin fáa eina loysn á málinum.

**Tekniska nevnd 26. juni 2006:** Nevndin var á staðnum. Vísandi til 2003-2267/19 samtykti nevndin ikki at gera meira við málið.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti at boða umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at gera brúk av servituttrættinum at yvirtaka atkomuvegin til matr. nr. 667d og at loyva umsøkjaranum at binda í henda vegin, treytað av at 2 p-pláss verða gjørd inni á ognini matr. nr. 666b.

**Nýtt:**
Vísandi til at umsøkjarin ikki sleppur inn á sína ogn, matr. nr. 666b, Tórshavn, at gera 2 p-pláss sambært samtykt í teknisku nevnd 13. desember 2006 vegna vantandi atkomumøguleikar, og at eigarin av grannaognini, matr. nr. 667d, Tórshavn, ikki er sinnaður at loyva umsøkjaranum atkomu á hansara vegaøki, hevur tekniska nevndin staðfest sína støðu í málinum: *at kommunan ætlandi skal gera brúk av servituttrættinum at yvirtaka atkomuvegin til matr. nr. 667d og at loyva umsøkjaranum at binda í henda vegin.*

Býráðið skal tískil um fíggjarnevndina staðfesta samtyktina í teknisku nevnd frá 13. desember 2006.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Útsett til nærri kanningar.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Útsett til næsta fund.

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at bíða við yvirtøkuni av atkomuvegnum til ólóglig bygging á matr. nr. 666b er tikin niður, sambært samtyktum í byggi- og býarskipanarnevndini 14. apríl 2004 og 15. september 2008.

Ein minniluti, Heðin Mortensen vísir til samtykt í teknisku nevnd 13. desember 2006 og vísir á, at umsøkjarin ikki sleppur inn á ogn sína matr. nr. 666b, Tórshavn, og mælir býráðnum til at kommunan ger brúk av servituttrættinum at yvirtaka atkomuvegin til matr. nr. 666b, soleiðis at umsøkjarin kann binda í vegin.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 21.15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Vagnur Johannesen | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |